RÁÐGEVARAFELAGIÐ

Heystið 2016

# FØROYSK RÁÐGEVING

Arkitektar | Verkfrøðingar | Byggifrøðingar



## Føroyar kunnu vera sjálvveitandi við ráðgevaratænastum

## Vitanarvinna við fjølbroyttum førleikum

## Føroyingar ráðgeva eisini uttanlands

**Útgevari**
Ráðgevarafelagið
Óðinshædd 7
FO-100 Tórshavn
industry@industry.fo

**Skrivað**
Uni Arge
uniarge@gmail.com

**Layout**
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

**Prent**
Føroyaprent
www.foroyaprent.fo
info@foroyaprent.fo

**Kápumynd**
Landssjúkrahúsið
SNA
sna@sna.fo

**Upplag**
1.500 eintøk

## Føroysk ráðgeving

Hetta blaðið hevur Ráðgevarafelagið latið gera, sum er felagið hjá arkitektafyritøkum, verkfrøðingafyritøkum og byggifrøðifyritøkum í Føroyum. Endamálið hjá felagnum er at savna allar ráðgevandi fyritøkur við heimstaði í Føroyum, serliga í byggivinnuni, at útinna felags áhugamál.

Endamálið er eisini at styðja upp undir samskifti og førleikamenning millum limafeløgini og virka sum felags málgagn mótvegis myndugleikum, stovnum og aðrari vinnu í málum, sum viðkoma ráðgevaravinnuni. Felagið varð stovnað í 2008 og heldur til í Vinnuhúsinum.

Føroysk ráðgevaravinna er nógv meint seinastu áratíggjuni, og avrikini hjá føroyskum ráðgevarum eru mong og fjølbroytt, eins og sæst í blaðnum. Áhaldandi minnir Ráðgevarafelagið á, at føroyskar ráðgevarar skulu hava líka góðar møguleikar at bjóða upp á verkætlanir sum útlendskar fyritøkur.







**4** Føroyar kunnu vera sjálvveitandi við ráðgevaratænastum

**10** Vitanarvinna við fjølbroyttum førleikum

**13** Føroyingar ráðgeva eisini uttanlands

**16** Stór og fjølbroytt avrik í vinnuni

**21** Tann góða verkætlanin

**22** Eg droymdi altíð um at gerast arkitektur

**26** Tilknýti til føroyska fyritøku var gull vert

**28** Ráðgeva meira fyri privata geiran

**30** Nógvar spennandi avbjóðingar í Føroyum








32 Útbjóðing ofta ein avbjóðing

34 Ráðgevarafelagið hvassorðað í tunnilsmálinum

36 Hava nú eisini brunatrygd sum serøki

38 Steingrund ráðgevur um ljóð




# Føroyar kunnu vera **sjálvveitandi við ráðgevaratænastum**

**Í Føroyum eru 26 arkitektastovur, verkfrøðingavirkir og byggifrøðifyritøkur við 120 starvsfólkum. Ráðgevaravinnan er nógv ment farnu hálvu øldina og mennist framvegis. Stundum kemur tó fyri, at útlendskir ráðgevarar verða tiknir framum í stórum verkætlanum. Hetta er óneyðugt, tí Føroyar kunnu vera sjálvveitandi við ráðgevaratænastum, sigur Selmar Nielsen, formaður í Ráðgevarafelagnum**





Í 2008 varð stóra miðnámsskúlabyggingin í Marknagili á fyrsta sinni sett á skinnarar, og við hesi stórfingnu byggiætlan kundi væntast, at føroyskar ráðgevarafyritøkur fóru at fáa lut í arbeiðinum. Tær bíðaðu eisini spentir eftir útboðnum.

Bilsnir vóru føroyskir ráðgevarar, tá útlendskar ráðgevarafyritøkur brádliga fóru at ringja til teirra og biðja um samstarv í sambandi við verkætlanina í Marknagili. Arbeiðið var fyrst boðið út í grannalondunum – og føroyingarnir vistu ikki av tí.

Hetta kløkkaði ráðgevararnar so nógv, at tær komu saman at avráða, hvat skuldi gerast. Úrslitið varð, at tær stovnaðu Ráðgevarafelagið, sum skuldi standa fyri at fremja áhugamálini hjá føroysku ráðgevaravinnuni mótvegis myndugleikum og almenningi.

## Tala søkina hjá vinnuni

Formaður í felagnum er Selmar Nielsen, sum eigur og rekur arkitektavirkið SNA við Landavegin í Havn. Vegna felagið hevur hann fleiri ferðir seinnu árini gjørt vart við, at álitið á førleikarnar hjá føroysku ráðgevarafyritøkunum kundi verið størri.

Hvassur var tónin m.a., tá tunnilsfelagið, ið stendur fyri at gera Eystur- og Sandoyartunlarnar, uttan útboð gjørdi av at lata eitt norskt felag projektera tunlarnar. Ráðgevarafelagið sendi tá øllum politiskum flokkum eitt skriv, har felagið mótmælti stignum hjá tunnilsfelagnum.

Í semju 6. februar í 2014 høvdu politisku flokkarnir ásannað, at í undirsjóvartunlunum, sum frammanundan vóru gjørdir, hevði ráðgevingin verið útlendsk við føroyskum ískoyti. Nú skuldu nýggju tunlarnir kasta so nógv virksemi av sær í Føroyum sum gjørligt.





> “RÁÐGEVARAVINNAN ER MENT SO LÍÐANDI, OG FORTREYTIN FYRI, AT HON KUNDI MENNAST, VAR JÚST, AT FLEIRI HØVDU ÁLIT Á FØROYSKU VEITARUNUM

"Ráðgevaravinnan í Føroyum hevur í hálva øld prógvað, at hon kann standa fyri øllum sløgum av arbeiðum. Vit gera vart við hetta, tá tað krevst, tí ikki altíð tykist álitið á føroysku fyritøkurnar at vera nóg stórt. Men misálitið er púra ógrundað," sigur Selmar Nielsen.

Hann vísir á, at í Føroyum eru fyritøkur, sum farnu hálvu øldina hava projekterað tunlar, havnir, brýr, orkuverk, farstøðir, sjúkrahús, røktarheim, framleiðslubygningar, skúlar og mangt annað. Vinnan hevur drúgvar royndir og vitan um at byggja land júst í Føroyum.

"Føroyskir ráðgevarar kenna umstøðurnar í Føroyum betur enn nakar annar. Tann vitan, fyritøkurnar hava um umstøður og tørv her, er ein eyðsýndur fyrimunur, og tær royndir, tær hava fingið, hava ment vinnuna til tað, hon er í dag," sigur hann.

## Umsetningur kann vaksa

Ein uppgerð hjá Ráðgevarafelagnum vísir, at ráðgevarafyritøkurnar gera flest arbeiðir fyri kommunurnar, so vinnulívið og síðan landið. Men umsetningurin er lutfalsliga minni enn í Danmark, tí í summum stórum verkætlanum fóru útlendskar fyritøkur við arbeiðunum.

"Vit hava onkuntíð hoyrt, at føroyskar fyritøkur verða settar afturum, tí vit skulu ikki hava manning til størstu uppgávurnar. Hetta er ein løgin grundgeving. Allar fyritøkur dubba seg eftir einstøku uppgávunum, eisini t.d. norðmenn í tunnilsarbeiðum í Føroyum," sigur Selmar Nielsen.

Hann vísir á, at fáa føroysku fyritøkurnar ikki størstu uppgávurnar, verða tær hildnar niðri bæði fakliga og í støðd. Grundgevingin um, at tær eru lítlar, verður ein sjálvuppfyllandi profeti, sum føroyingar sjálvir skapa, og tað kann ikki vera meiningin.

"Sum vinna hava vit størri ambitiónir enn at vera ískoyti til stórarbeiðir, ið onnur gera. Ráðgevaravinnan er ein vitanarvinna við fakligum stoltleika, og skulu vit draga nýggj fólk heim, mugu vit allatíðina hava spennandi uppgávur at bjóða teimum," sigur Selmar Nielsen.

Ambitiónirnar hjá føroysku ráðgevarunum hava ført fleiri teirra út um landoddarnar. LBF og SMJ ráðgevandi verkfrøðingar hava gjørt arbeiðir í Grønlandi, og SNA standa fyri at projektera eina amerikanska sólorkuverksmiðju í Íslandi, sum MT Højgaard byggir.

"Føroyskir ráðgevarar eru eftirspurdir uttanlands, m.a. á amerikonsku flogstøðini í Thule, har SMJ hevur samstarvað við Greenland Contractors. Í Íslandi hava amerikanarar eisini álit á, at føroyingar kunnu standa fyri at projektera eina nýskapandi verksmiðju," sigur hann.

## Vinnan mentist so líðandi

Ráðgevaravinnan í Føroyum er lutfalsliga ung. Ferð kom á hana, tá framskygdar kreftir fóru at stovna egnar fyritøkur í sekstiárunum, og persónar í lyklastørvum, m.a. Mikkjal Helmsdal, landsverkfrøðingur frá 1948 til 1988, syrgdi fyri, at fyritøkurnar fingu brúkt sínar førleikar.

Landsbyggifelagið, nú LBF, varð stovnað í 1964. Felagið hevur verið uppi í fleiri enn 1.700 verkætlanum. Sofus M. Jakobsen kom heim sum ráðgerandi verkfrøðingur og setti á stovn egna fyritøku í 1969. Eisini hendan fyritøkan hevur verið uppi í alskyns verkætlanum.

Innan arkitektayrkið gingu menn sum Palle Gregoriussen og Olaf Mortensen á odda. Síðan kom eitt nýtt ættarlið heim og setti á stovn arkitektavirkir, m.a. Albert Isfeld, Gudmund Hansen og Árni Winther. Eftir teir hava uppaftur yngri arkitektar stovnað arkitektastovur.

"Ráðgevaravinnan er ment so líðandi, og fortreytin fyri, at hon kundi mennast,

var júst, at fleiri høvdu álit á føroysku veitarunum. Allastaðni kring landið hava føroyskir ráðgevarar sett síni merki, um so talan er um bygningar, anleggsarbeiðir ella planlegging," sigur Selmar Nielsen.

Hann heldur, at í løtuni eru útlitini hjá vinnuni góð, tí væl gongst í samfelagnum. Men vinnan er viðbrekin. Fer at ganga aftur á hond búskaparliga, kann hon vera fyri afturstigi, og tá krevst, at vinnan er brynjað til at tillaga seg.

"Ambitiónin má vera, at vit eru sjálvveitandi við ráðgevaratænastum í Føroyum og eisini útflyta ráðgevaratænastur. Vit tosa nógv um at skapa vitanarvinnur sum alternativ til siðbundnu vinnurnar, og ráðgevaravinnan er avgjørt ein av hesum vinnunum," sigur Selmar Nielsen.



"

AMBITIÓNIN MÁ VERA, AT VIT ERU SJÁLVVEITANDI VIÐ RÁÐGEVARATÆNASTUM Í FØROYUM OG EISINI ÚTFLYTA RÁÐGEVARATÆNASTUR



# Vitanarvinna við fjølbroyttum førleikum

Í flestu fyritøkunum í ráðgevaravinnuni starvast millum 4 og 10 fólk. Men nakrar fyritøkur eru størri og fleiri minni. Førleikarnir í fyritøkunum byggja á vitanina og royndirnar, sum leiðslur og starvsfólk hava ognað sær við útbúgvingum og arbeiðum. Veitaraskráin hjá Ráðgevarafelagnum vísir væl, hvussu nógvir førleikar eru í vinnuni






Í føroysku ráðgevaravinnuni eru ark-itektavirkir, verkfrøðingafyritøkur og byggifrøðivirkir. Uppgávan hjá einum arkitekti líkist ikki heilt uppgávuni hjá einum verkfrøðingi, men ráðgeving krevst á øllum økjum, og samstarv er lykilin til, at verkætlanir verða væl úr hondum greiddar.

Veitaraskráin, sum Ráðgevarafelagið allatíðina dagførir á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, ber góðan vitnisburð um, hvussu fjølbroyttar førleikar føroyskir ráðgevarar hava. Tilsamans eru 26 fyritøkur í Ráðgevarafelagnum, og teirra veitingar eru so nógvar og fjølbroyttar, at illa slepst uttan um tær, tá sjøtul skal setast á verkætlanir.

## Projektera og leiða

Føroyskir ráðgevarar projektera bæði í sambandi við nýbyggingar, tilbyggingar, umbyggingar og endurbyggingar. Teir veita eisini heildarráðgeving, fakráðgeving og fakeftirlit í verkætlanum. Byggileiðslu, projekteringsleiðslu og umhvørvisleiðslu hava ráðgevarafyritøkurnar somuleiðis.

Byggiharrum verður eisini veitt ráðgeving, eitt nú um hugskot, fígging, tekniskar spurningar, uppmátingar og byggiskrá.

Hvat bygningum viðvíkur, hava fyritøkurnar víst, at tær eru førar fyri at veita ráðgeving í sambandi við bæði einfaldar og sera krevjandi uppgávur. Føroyskir ráðgevarar hava verið í fremstu røð í sambandi við eitt nú flogvallarbygging, sjúkrahúsbyggingar, orkuútbyggingar, skúlabyggingar og røktarheimsbyggingar.

Í sambandi við anleggsarbeiðir hava teir projekterað vegir, parkeringsøkir, parkeringshús, brýr, tunlar og havnir. Tekniskar anleggsuppgávur hava m.a. verið spillivatnsskipanir, fjarhitaskipan, vatnveitingarskipanir, olju- og gassskipanir, el-veitingarskipanir og renovatiónsskipanir.

## Eisini planlegging

Planlegging er eisini ein týðandi táttur í virkseminum hjá ráðgevarunum. Talan kann vera um landslagsplanlegging, býarplanlegging og byggisamtyktir.

Ráðgevingin kann haraftrat umfata at visualisera, animera og gera modell og at ráðgeva í sambandi við brunakrøv, akkustikk, inniluft, ferðslu og orkunýtslu. Førleikar innan sniðgeving eru eisini í vinnuni, t.d. í sambandi við innbúgv, útgerð og listprýðing.

# FØROYINGAR RÁÐGEVA EISINI UTTANLANDS



**Flestu uppgávurnar hjá føroyskum ráðgevarum eru í Føroyum, men teir eru eisini virknir uttanlands. SMJ ráðgevandi verkfrøðingar og LBF hava ráðgivið í Grønlandi, SNA projektera eina stóra amerikanska verksmiðju í Íslandi, og Ósbjørn Jacobsen í Gøtu var leiðandi arkitektur, tá Harpan í Reykjavík varð teknað**





Avrikini hjá føroyskum ráðgevarum í Føroyum tala sítt týðiliga mál, um so talan er um tunlar, havnir, brýr, bygningar ella planlegging av landsløgum og bygdum økjum, og alsamt fleiri eru eisini farnir at bjóða seg fram uttanlands.

SMJ ráðgevandi verkfrøðingar stóðu fyri ráðgevingini í sambandi við, at Greenland Contractors gjørdi umfatandi umvælingar á flogstøðini hjá amerikanarum í Thule. Føroyska fyritøkan var ráðgevi í sambandi við, at HVS- og sprinklaraskipanir í íbúðarblokkum, á verkstøðum og á radarastøðini skuldu høvuðsumvælast.

Til tess at kunna virka á amerikonsku flogstøðini í Thule skuldi SMJ hava amerikanska góðkenning, og hana fekk felagið umvegis ein undirveitara. Samstarv av tílíkum slag er vanligt, tá serligar góðkenningar krevjast.

Landsbyggifelagið, LBF, hevur ráðgivið í Grønlandi í sambandi við verkætlanir hjá MT Højgaard í námsvinnuni. Felagið var við til at gera tríggjar forkanningar í sambandi við útvinningarætlanir. Forkanningarnar umfataðu at gera fyrstu skitsurnar, útrokningarnar, hugskotini og geva eitt væl grundað boð upp á kostnaðin. LBF tók sær av øllum, sum hevði við vegagerðirnar at gera.

## Sólorkuætlan í Íslandi

Í juni 2015 kunngjørdu SNA og MT Højgaard, at føroyska arkitektafyritøkan skuldi standa fyri at projektera eina verksmiðju, sum amerikanska fyritøkan, Silicor Materials, letur byggja á Grundartanga 40 kilometrar uttan fyri Reykjavík. Hon skal framleiða silicon til sólorkuskipanir og verður 121.000 fermetrar til støddar.

MT Højgaard hevur gjørt sáttmála fyri 1,5 milliard krónur við Silicor Materials um at byggja verksmiðjuna. SNA standa fyri arkitektaarbeiðinum og samskipa tað. Í tí sambandi hevur føroyska fyritøkan avtalu við íslendsku arkitektafyritøkuna Úti og Inni, sum er samstarvsfelagi í sambandi við arbeiðið.

Ein grunnur í New York, sum kallast Hudson Clean Energy, er høvuðsíleggjari á Grundartanga. Framleiðslan á virkinum verður rein. Málmur verður hitaður upp og køldur niður, so silicon at enda skilir seg úr honum. Síðan verður tað stoypt í klumpar og brúkt í sólsellunum. Talan er um eina nýskapandi framleiðslugongd.





*Verksmiðjan á Grundartanga*

Verksmiðjan á Grundartanga verður væntandi latin eigarunum í 2019. MT Højgaard segði, tá sáttmálin við føroysku fyritøkuna varð undirskrivaður, at hon var í fremstu røð tøkniliga og í allar mátar hevði verið professionell í sambandi við sáttmálasamráðingarnar.

## Stóð á odda fyri Hørpuni

Bæði føroyskir verkfrøðingar, arkitektar og byggifrøðingar hava virkað uttanlands styttri og longri tíðarbil, og ein teirra er Ósbjørn Jacobsen í Gøtu. Hann var leiðandi arkitektur í sambandi við, at Harpan, sum nú er víðagitið ferðavinnumál í Íslandi, varð bygd.

Upprunin til Hørpuna var, at kapping varð útskrivað í 2004 um at gera ein mentanar- og ráðstevnudepil í eystara parti av Reykjavíkar havn, tí lív skuldi fáast í havnina. Bara fýra samtøk vóru før fyri at bjóða upp á verkætlanina, og vinnarin gjørdist Portus Group við Henning Larsen Architects og listamanninum Ólafi Eliasson.

Ósbjørn Jacobsen starvaðist Hjá Henning Larsen Architects og fekk ein avgerandi leiklut í 2005, tá hann varð settur sum leiðandi arktiektur fyri allari verkætlanini. Í tøttum samstarvi við Ólaf Eliasson evnaði hann til ta sjáldsomu glasfasaduna, sum skapar ljósspælið inni og úti í Hørpuni.

Harpan kostaði 1,4 millard krónur, og tað varð hildið at vera nógv, serliga tá fíggjarkreppan var farin at gera um seg í 2008. Men nú tosar ongin um prísin longur.

Ósbjørn Jacobsen hevur sagt, at bygningurin er sprottin úr spenningsfeltinum millum funktionellu krøvini og ynskið um at skapa ein bygning, sum hóskar til umhvørvið rundanum. Vítt er til veggja og høgt til loftið í Hørpuni, og dentur er lagdur á sambandið við íslendsku náttúruna.

Veggirnir er kollittir sum íslendskt gosgrýti, gólvið er úr gróti av Selfossi, og teir fýra salirnir í bygninginum hava nøvn eftir vatni, jørð, ljósi og eldi.



# STÓR OG FJØLBROYTT AVRIK Í VINNUNI

**Føroyskir ráðgevarar hava loyst nógvar ymiskar uppgávur millum ár og dag, ið umfata bæði orkuverk, sjúkrahúsbygningar, undirsjóvartunlar, sermerktar bygningar og flogvallarfarstøð. Í fleiri førum hava ráðgevararnir samstarvað í samtøkum um stórar uppgávur**

**Í hesum yvirlitinum verða nevndar 15 av teimum mongu verkætlanunum, sum føroyskir ráðgevarar hava loyst. Dømini eru vald eftir, hvussu fjølbroytt tey eru, tí ráðgeving kann vera so mangt - alt frá at tekna bygningar til at hava fakeftirlit við tunnilsgerð**

## Vágsverkið útbygt

Fyri at nøkta el-tørvin í Suðuroynni økir SEV orkumáttin á Vágsverkinum. Vágsverkið verður víðkað við einum motori, og el-net, rørskipan, dagtangahús, tangagarður og bygningar verða dagførd. SMJ ráðgevandi verkfrøðingar hevur byggi- og projekteringsleiðsluna. Arbeiðið umfatar bruna- og trygdarráðgeving, installatiónir, orkuráðgeving og umhvørvis-ráðgeving. Aðrir ráðgevarar eru P.A. Petersen, LBF og SNA.





## H-bygningur til Landssjúkrahúsið

Nýggi sjúkrahúsbygningurin verður 10.000 fermetrar til støddar og skal hýsa psykiatriska deplinum, somatiskum seingjarplássum, rehabilitering, burðar- og barsilsdeild og køki og kantinu. Bygningurin verður projekteraður eftir 3D-modellum. Sáttmáli millum Landsverk og ráðgevarar varð undirskrivaður 26. februar 2014. Ráðgevarar eru Samtakið Fareport II. Í tí eru Árni Winther Arkitektar, SNA, LBF, KJ Elráð og SMJ ráðgevandi verkfrøðingar.

## Norðoyatunnilin og Vágatunnilin

Aftrat fjølbroyttu royndunum at projektera eitt nú havnir, bygningar og brýr í 50 ár hevur LBF mangar ítøkiligar royndir við vega- og tunnilsarbeiði. Í Vágatunlinum og Norðoyatunlinum hevði felagið byggileiðsluna og stóð fyri at gera linjuføringina og projektera vegir. Í sambandi við Viðareiðistunnilin gjørdi felagið linjuføringina og projekteraði vegir, tunnilin og el-installatiónir. Eisini hevur felagið projekterað tunnilin, vegirnar, gjørt linjuføringina og havt fakeftirlitið í Eiði 2 suður-ætlanini hjá SEV.





## Bygningur hjá BankNordik

Við síni glasfasadu er bygningurin hjá BankNordik við Húsagarð innbjóðandi, og tá myrkrið legst yvir hann, skapar rondin av ljósrørum uppi undir loftinum eitt eyðkent gandakent mynstur á heygnum. MAP Arkitektar teknaðu bygningin og høvdu byggilistarligu leiðsluna, tá hann varð gjørdur. MAP Arkitektar løgdu dent á, at meginparturin av økinum við Húsagarð enn er upprunaligt við vøkstri í hagalendi, og hendan forkunnuga og sjáldsama sjónin í býarumhvørvinum skuldi varðveitast. LBF stóð fyri konstruktiónum, PB Consult fyri HVS og KJ Elráð fyri el.

## Farstøðin á flogvøllinum

Í kapping við trý onnur samtøk vann føroyska samtakið, Faerport, í 2011 kappingina um at tekna nýggja farstøð á flogvøllinum í Vágum. Farstøðin hevur altjóða snið og er munandi størri enn tann gamla. Í samtakinum eru Árni Winther Arkitektar, SNA, SMJ ráðgevandi verkfrøðingar og LBF. COWI Consult var undirráðgevi hjá samtakinum. Í uppskotinum hjá Faerport varð dentur lagdur á, at nýggi terminalurin skuldi hóska væl inn í lendið við flogvøllin. Ein íblástur, tá uppskotið varð gjørt, vóru barakkirnar hjá bretum undir krígnum.





## Skúlin við Løgmannabreyt

Stórur dentur er lagdur á, at byggiháttur, innrætting, litir, ljós og myndlist skuldu skapa eitt kveikjandi læruumhvørvi í Skúlanum við Løgmannabreyt. Á skúlanum eru allir nútímans hentleikar, so til ber at hava eitt fjølbroytt undirvísingarvirksemi, ið er lagað eftir tørvi og fortreytunum hjá næmingunum. Árni Winther Arkitektar stóð fyri heildarráðgeving, projekteringsleiðslu, byggileiðslu og ráðgeving viðvíkjandi innbúgvi, útgerð og list.

## Hoyvíkar kirkja

Tórshavnar kommuna játtaði í 2005 byggiloyvi til tvey stór hús í Hoyvík, eitt samkomuhús og eina kirkju. Kirkjan sæst nú vestan fyri Hoyvíkar skúla á einum stykki, sum er 5.700 fermetrar. Arkitektavirkið hjá Albert Isfeld og Gudmundi Hansen teknaði Hoyvíkar kirkju, sum í dag er eitt býarmerki í hesum skjótt vaksandi nýbyggjaraøkinum. Aðrir ráðgevarar vóru Preben Hansen, konstruktiónir, Martin E. Leo, HVS, Viggo A. Hansen, el-installatiónir, og Johannes Steingrund, ljóðteknikkur.





## G-bygningurin á Landssjúkrahúsinum

Sum liður í framhaldandi at nútíðargera Landssjúkrahúsið varð sjúkrahúsið víðkað við einum tilbygningi á 5.500 fermetrar. Bygningurin kostaði 156 mió. kr. Á niðastu hædd eru rannsóknarstova við blóðbanka og kemisk, mikrobiologisk og patologisk rannsóknarstova. Á aðru hædd eru skaðastova, intensiv deild og kommunulæknahøli. Á triðju hædd er skurðstova og á fjórðu hædd skurðseingjardeild. Arkitektavirkið hjá Árna Winther stóð fyri arkitekturi, innbúgv og útgerð og hevði byggileiðsluna. LBF og SMJ ráðgevandi verkfrøðingar vóru eisini við.

## Skúlin á Skúlatrøð í Klaksvík

Fuglark hevur sum høvuðsráðgevi staðið á odda fyri hesi verkætlanini, ið er fyrsta byggistig av trimum. Talan er um størstu verkætlanina hjá Fuglark sum høvuðsráðgevi nakrantíð. Fíggjarkarmurin er 100 mió. kr. Fuglark hevur gjørt avtalu við Sámal Johannesen um konstruktiónir, SMJ ráðgevandi verkfrøðingar um HVS, ventilatión og el og Steingrund Akustik um ljóðviðurskifti. Eftir ætlan skal fyrsta byggistig standa liðugt í mai 2018.





## Glasir í Marknagili

Ráðgevingartoymið Team FUGLARK vann í 2009 kappingina um Skúladepilin í Marknagil, nú nevndur Glasir. Bygningurin er innilokaður, og innrættingararbeiðið er ávegis. Ráðgevingartoymið hevur verið skipað við Fuglark og BIG Bjarke Ingels Group sum arkitektum og føroysku verkfrøðingafyritøkunum Sámal Johannesen, Martin E. Leo og KJ Elráð, nú SMJ ráðgevandi verkfrøðingar. Fyrri partur av arbeiðinum var við miðstøð í Føroyum og tann seinni í Danmark. Toymið hevur fyri tað mesta sitið saman og arbeitt.

## Brúgvin um Sandá

Nýggja brúgvin um Sandá varð tikin í nýtslu 28. mai 2016 í sambandi við, at 150 ár vóru liðin, síðan Tórshavnar kommuna fekk sítt fyrsta býarstýri. Brúgvin er snotilig og eyðkend við bogaðu súlunum, sum bera brúnna, og er eitt prýði at síggja av sjónum eisini. SNA og LBF projekteraðu brúnna fyri Tórshavnar kommunu. Brúgvasúlurnar eru úr betongi, meðan brúgvakassin er gjørdur úr stálsektiónum, sum vórðu lyftir upp á pláss. Við nýggju brúnni er nógv trýst tikið av ferðsluni um gomlu brúnna við Sandagerð.





## Føroya Løgting

Í 1999 varð útskrivað kapping um at nútímansgera løgtingið, og kappingina vunnu MAP Arkitektar. Umstøðurnar hjá løgtinginum høvdu leingi verið ónøktandi, tí ov lítið pláss var til umsiting og løgtingslimir. Arbeiðið snúði seg m.a. um at leggja gamla bygningin hjá Telefonverki Føroya Løgtings aftrat løgtingshúsinum og við gongd ímillum fáa bygningarnar at rigga sum eina heild. Fasadurnar vórðu broyttar, so løgtingið gjørdist ráhvítt í staðin fyri svart við flagtekju, og telefonverksbygningurin varð listprýddur. Inni eru skrivstovur, kafeteria, fjølmiðlarúm, arbeiðsrúm og aðrir hentleikar.

## Musikkskúlin

Tórshavnar Musikkskúli hevur í mong ár húsast undir ov trongum kørmum, og í fleiri ár hevur verið í umbúna at byggja nýggjan musikkskúla í høvuðsstaðnum. Longu í 2011 kundi arkitektafyritøkan Kontrast við Mayfinni Norðoy og Kára Dal-Christiansen greiða býráðnum frá verkætlanini og bygninginum, sum hevði ein klovnan klett sum fyrimynd. Bygningurin er tó ikki komin upp at standa enn. Ætlanin var upprunaliga at staðseta hann við Norðurlandahúsið, men síðan er hann fluttur fleiri ferðir runt í býnum. Tað seinasta nýggja er, at hann er boðin út.





## Vindmyllulund í Húsahaga

Tær 13 vindmyllurnar í Húsahaga øktu munandi um el-framleiðsluna burtur úr varandi orkukeldum. Árliga meðalframleiðslan úr vatni og vindi tilsamans er umleið 60 prosent av allari el-framleiðsluni. Vindmyllulundin í Húsahaga nærum trífaldaði vindorkuna á el-kervinum - úr 8 prosentum upp í 23 prosent. Harumframt stava umleið 35 prosent av árligu el-framleiðsluni frá vatni. LBF stóð fyri projekteringini í sambandi við, at vindmyllulundin varð gjørd.

## Trappan í Vágsbotni

Tann 17. september í 1983 varð Perlan rivin niður í Vágsbotni, og fleiri harmaðust um, at hetta kenda tónleikastaðið hvarv. Í meira enn 30 ár var bara ein grønur blettur á plássinum, har illa farna og lítið vakra húsið hevði staðið, men so skipaði Tórshavnar kommuna í 2015 fyri arkitektakapping um miðbýin, sum Zeta Arkitektar vunnu. Ein partur av vinnandi uppskotinum var nýggja trappan í Vágsbotni. Hon hevur skapt hugna og lív í býnum, m.a. tí hon er bæði prýðilig og praktisk hjá yngri sum eldri og fullførum sum ófullførum at brúka.



# Tann góða verkætlanin

**Nógvar byggiverkætlanir eru væl eydnaðar, men summar eru ikki. Nær ein verkætlan er væl eydnað, veldst um sjónarhornið hjá teimum, sum eru partur av henni, sigur Árni Winther, arkitektur. Byggiharrin kann fegnast um, at tíðarætlan og kostnaður hildu, men eru brúkararnir ónøgdir, er ætlanin so væl eydnað, spyr hann**



Óneyðugt er ivaleyst at nevna nøvn, tí tey flestu hava hoyrt um byggiverkætlanir, ið endaðu sum stríðsmál í almenna rúminum, tí byggingin gekk ikki, sum hon skuldi.

Flestu byggiharrar, byggifyritøkur og ráðgevarar hava sína hugsan um, nær ein verkætlan eydnast væl, men svarið er ikki eintýtt, vísir Árni Winther á.

"Hvussu ein verkætlan verður mett, veldst um áhugamálini hjá teimum, sum eru við í henni. Har eru bæði byggiharri, byggifyritøka, ráðgevarar, myndugleikar og brúkarar t.d. At byggiharrin er nøgdur, nýtist ikki at merkja, at brúkararnir eru tað," sigur hann.

## Flogvallarbygging

Hann nevnir Vága floghavn sum dømi, har eitt føroyskt samtak stóð fyri ráðgevingini, og ein føroysk byggifyritøka stóð fyri arbeiðinum fyri føroyskan myndugleika. Byggiharrin, Vága floghavn, var nøgdur, tí kostnaður og tíðarætlan hildu, og myndugleikin, Vinnumálaráðið, fekk tað, hann bað um.

Men ráðgevararnir hildu, at ambitiónirnar vóru í minna lagi, og tá nýggi flogvallarbygningurin var liðugur, vóru brúkararnir ónøgdir, tí plássið, har teir skuldu bíða eftir fólki, var minni enn í gomlu farstøðini. Hetta komst av, at hølini til tollfríu søluna vórðu raðfest hægri.

"Samanumtikið var verkætlanin væl eydnað á summum økjum, men øll hildu ikki, at úrslitið var optimalt. Og soleiðis kunnu ymsar verkætlanir metast á ymsan hátt," sigur Árni Winther.

## Norðurlandahúsið

Hann nevnir Norðurlandahúsið sum eitt annað dømi. Tann byggingin var umstrídd, tí byggingin kostaði fleiri ferðir tað, sum upprunaliga varð ætlað, og nógvur almennur tvídráttur var um hann. Á tann hátt var verkætlanin ikki væl eydnað.

Men tá húsið var liðugt, var úrslitið ein bygningur, sum ongin annar bygningur í Føroyum kann metast við, og sum er kendur langt út um landoddarnar. Øll, sum fáast við list, tónleik og sjónleik, vilja upptraðka ella sýna fram í Norðurlandahúsinum, tí húsið er serligt.

"Tað gekk illa at byggja Norðurlandahúsið, og tú kanst kalla tilgongdina eina gølu. Men úrslitið, sum kom burturúr, var ein sólskinssøga. Kanska hevði Norðurlandahúsið als ikki verið eitt serstakt hús, um pengarnir av fyrstan tíð passaðu," sigur Árni Winther.

## Læra av tí góða

Hann heldur, at tá byggiverkætlanir fara av lagi, er reaktiónin ofta, at byggiharrar herða eftirlitið og seta uppaftur fleiri krøv í sambandi við næstu verkætlanirnar. Byrokratisku mannagongdirnar gerast tí bara tyngri. Men væl ber til at hugsa øvugt.

"Í staðin fyri at hugsa ov restriktivt eiga vit at royna at læra av teimum góðu royndunum, tí vit hava nógvar góðar royndir, eisini í verkætlanum, sum mong upprunaliga mettu sum miseydnaðar," sigur Árni Winther at enda.



# EG DROYMDI ALTÍÐ UM AT GERAST ARKITEKTUR

"Mítt móðirland hevur myndað meg, og nú vil eg fegin vera við til at mynda mítt móðirland," sigur 30 ára gamla Ingunn Finnleifsdóttir Norðberg, sum í 2014 fekk útbúgving sum arkitektur og síðan flutti heim at arbeiða hjá Selmari Nielsen Arkitekti. Hon fegnast um at kunna virka í Føroyum, tí teknistovurnar her loysa ofta stórar uppgávur og vísa nýggjum starvsfólkum stórt álit



Ingunn Finnleifsdóttir Norðberg hevur altíð havt fagurfrøðiligan ans. Tá hon var smágenta, settist hon mangan við borðið í spísistovuni hjá mammu og pápa sínum at tekna. Har læt hon hugflogið ráða, og longu tá var hon nærløgd og kravdi nógv av sær sjálvari. Tað, hon fekst við, skuldi vera gott - og helst fullkomið.

Í 2005 gjørdist Ingunn málsligur studentur í Hoydølum og fekk árið eftir eisini prógv á Føroya Handilsskúla. Eftir loknu skúlagongdina slapp hon inn á teknistovuna hjá Alberti Isfeld og Gudmundi Hansen at gera fyrifallandi arbeiði.

Ætlanin var, at hon skuldi vera har í tvær vikur, men teir báðir sóu skjótt, at unga gentan dugdi væl at handfara tøkni, eitt nú 3D-visualiseringar. Eisini fór hon undir at talgilda gomlu verkætlanirnar, sum í fleiri ár høvdu savnað dust í kjallaranum, og skjótt vóru tvey lærurík ár umliðin á teknistovuni.

"Tá eg hevði verið hjá Alberti og Gudmundi, gjørdi eg endaliga av at fara at lesa til arkitekt. Eg visti longu tá, at eg ætlaði mær heimaftur. Tú ert við í so mongum, tá tú arbeiðir í Føroyum. Eg upplivdi m.a. at vera við á byggiharrafundum og eftirlitsfundum. Tílíkt álit verður neyvan altíð víst teimum ungu aðrastaðni," sigur Ingunn Finnleifsdóttir Norðberg.

## Avbjóðandi lestrarár

Hon fór at lesa á Kunstakademinum í Keypmannahavn í 2008. Har læt seg upp ein heilt nýggjur heimur fyri henni. Sum lesandi vórðu tey at kalla brotin niður fatanarliga, so tey kundu byggjast uppaftur á nýggjan hátt. Tað var avbjóðandi, men spennandi.

"Eg kendi meg slepta upp á fjall fyrstu tíðina, tí eg skuldi læra at hugsa av nýggjum. Tað, at eg hevði nakrar praktiskar royndir, merkti ikki, at eg hugsaði sum ein arkitektur. So líðandi mentist tó ein hugsunarháttur, og eg fekk neyðugu metodisku amboðini. At lesa eitt listarligt fak er øðrvísi enn at lesa eitt fak við endaligum svarum. Tað krevur meira kreativt umhugsni," sigur hon.

Á skúlanum vóru stundir til at fara heilt í dýpdina við arkitektoniskum evnum. Høvuðsuppgávan var um føroysk viðurskifti. Hon snúði seg um at byggja aftrat og umbyggja Sápufabrikkina við Eystara Ringveg, sum H. C. W. Tórgarð teknaði í 1938. Fabrikkin varð gjørd til eitt hús til listahandverkarar. Í hesum sambandi fekk Ingunn gott innlit í føroysku byggilistasøguna, og ein hugur kveiktist í henni at tekna aftrat hesum mentanararvi.

"H. C. W. Tórgarð hevur skrivað nøkur fá gullkorn um arkitektur, har hann lýsir eina



eldri føroyska bygd við húsum úr gróti og flagi, ið lógu spjødd heldur tilvildarliga í bygdini. Á hendan hátt skaptu tey lívd fyri hvør øðrum, helt hann. Í hansara tíð komu aluminiumskløddu húsini í beinari røð fram við skipaðum gøtum, og tey helt hann síggja undarliga nakin út í harðbalna veðurlagnum. Hansara umhugsanir vísa, at umráðandi er at hugsa alt tilfar inn í veðurlagið, tú byggir í. Kanska verður hetta ikki altíð gjørt nóg væl," sigur Ingunn Finnleifsdóttir Norðberg.

## Fekk dreymastarv

Nú er hon so í starvi hjá Selmari Nielsen, og tað dámar henni væl, tí uppgávurnar eru fjølbroyttar og avbjóðandi.

"Eg havi fingið mítt dreymastarv," sigur hon, men ásannar, at tað tekur tíð at rótfesta seg í fakinum. "Tá tú sum nýútbúgvin kemur heim, hevur tú ikki somu royndir, vitan og sambond, sum hini hava, so hetta skal alt byggjast upp. Gott er tá at koma á eitt arbeiðspláss, har fólk allatíðina eru til reiðar at hjálpa tær."

Ingunn heldur tað vera umráðandi at vera eyðmjúk í starvinum, tí okkurt nýtt er altíð at læra, sum kann menna teg uppaftur meira. Fagurfrøðiliga ansin, hon longu hevði sum smágenta, ber hon við sær í øllum, hon ger.

"Ofta er einfeldi tað snøggasta. Tað lítla húsið, sum høviskliga biður um at læna eitt petti av lendinum, er ofta meira spennandi enn tann stóri bygningurin, sum skríggjar eftir uppmerksemi og køvir lendið," sigur hon.



Tá hon verður spurd, hvør hennara dreymaverkætlan er, svarar hon, at utopiska hugsanin um at tekna eitt heildarlistaverk niður í minstu smálutir uttan fíggjarligar avmarkingar er dragandi.

"Tað fíggjarliga má sjálvandi seta karmarnar, men estetikkur og trivnaður í fysisku kørmunum mugu ikki undirmetast. At gera sær ómak er altíð ein dygd. Tað kostar sjáldan meir at stoypa ein vegg prýðiligan í staðin fyri at stoypa hann ljótan. Nærlagni í smálutunum myndar heildina," sigur hon.

Ingunn hevur allatíðina í huga áminningina, sum stóð skrivað í medaljongini, ið rektarin á Kunstakademinum bar til serlig høvi: "Skønt det synes, som vi leger, er fædrelandets fremgang arkitekternes stræben."

Soleiðis hugsar hon eisini, nú hon er farin til verka á føroyskari teknistovu.

"Mítt móðirland hevur myndað meg, og nú vil eg fegin vera við til at mynda mítt móðirland," sigur Ingunn Finnleifsdóttir Norðberg.

*Ingunn Finnleifsdóttir Norðberg ynskti altíð at gerast arkitektur*



# Tilknýti til føroyska fyritøku var gull vert

**Hann er útbúgvin byggifrøðingur og cand. scient. tech. Høvuðsritgerðina skrivaði hann í skrivstovuhølunum hjá SMJ ráðgevandi verkfrøðingum. Tað var motiverandi at vera knýttur at føroyskari fyritøku seinasta hálva árið av lestrinum, sigur 29 ára gamli Einar Johannessen, sum fekk starv hjá SMJ eftir loknan lestur**

Einar Johannessen hevur altíð havt áhuga fyri byggivinnuni, og í august 2009 fór hann tí at lesa til byggifrøðing í Danmark. Byggifrøðingur gjørdist hann í desember 2012, og beinanvegin eftir hetta fór hann undir kandidatútbúgvingina, ið endaði við høvuðsritgerð, sum lýsti, hvussu talgild tøkni og menniskju kunnu arbeiða saman.

Ritgerðin bar heitið "Talgilding í føroysku byggivinnuni," og Einar og lestrarfelagi hansara skrivaðu hana í skrivstovuhølunum hjá SMJ. Møguleikin at kunna skriva høvuðsritgerðina á einum virknum arbeiðsplássi, har teir møttu tíðliga hvønn morgun saman við hinum starvsfólkunum, hevði stóran týdning fyri motivatiónina.

"Hetta gav okkum allatíðina íblástur og hevði stóran fakligan týdning, tí vit kundu eygleiða, hvussu gerandisdagurin hjá eini ráðgevandi fyritøku var. Vit fingu eisini brúkt okkara eygleiðingar í ritgerðini, tí SMJ brúkar nýggjastu tøknina innan projektering," sigur Einar Johannessen.

Ritgerðin lýsti fyrimunir, vansar og avleiðingar av at nýta talgilda tøkni. Niðurstøðan var, at ikki altíð er talgild tøkni rætta loysnin í verkætlanum, tí nógvir arbeiðstímar krevjast ofta at nýta tøknina, og arbeiðstímar kosta pengar. Nýggj tøkni skapar ikki altíð neyðuga virðið í verkætlanum, staðfestu teir.

Nú er Einar í føstum starvi hjá SMJ, og tað fegnast hann um. Hann og familjan ivaðust ongantíð í, at tey skuldu aftur til Føroya, tá hann var liðugur at lesa.



"Summi vilja royna seg uttanlands í nøkur ár, tí tey halda, at tey fakliga verða betri fyri av tí. Eg var í starvsvenjing hjá danskari fyritøku, tá eg las til byggifrøðing, men har vóru akkurát somu toganir millum t.d. arbeiðstakarar og byggiharrar, sum vit onkuntíð síggja í Føroyum, so tað var ikki so, at eg helt professionalismuna vera størri í Danmark," sigur Einar Johannessen.

Hann er sannførdur um, at skrivaði hann ikki høvuðsritgerðina hjá SMJ, hevði hann ikki fingið starv har, tí fyritøkan hevði tá neyvan vitað um hansara førleikar. Men nú fær SMJ gagn av teimum.

"Í løtuni havi eg ábyrgdina av HVS-ráðgevingini í bygninginum hjá Bakkafrosti á Viðareiði. Mítt mál er at fáa alsamt størri ábyrgd í verkætlanum. SMJ er eitt gott arbeiðspláss við eini leiðslu, sum hevur álit á sínum starvsfólkum. Vit hava frælsi við ábyrgd og kunnu fara frá, um tað er neyðugt, men væntað verður, at tú gert tað, tú hevur ábyrgd av," sigur Einar Johannessen.




# Ráðgeva meira fyri privata geiran

**Ein uppgerð hjá Ráðgevarafelagnum vísir, at privati geirin keypir alsamt fleiri tænastur frá føroysku ráðgevaravinnuni. Privati parturin er vaksin úr 18 prosentum í 2011 upp í 37 prosent í 2015. Landsins partur er 22 prosent, og kommunurnar standa fyri 39 prosentum**

Fyritøkurnar í ráðgevaravinnuni gera arbeiðir fyri almennar stovnar og felagsskapir og privat feløg. Hesi tøttu samstørv eru grundarlagið undir virkseminum hjá vinnuni. Leingi var tað almenna, tvs. land og kommunur, nógv tann størsti kundin, men myndin er nógv broytt seinnu árini.

Í 2011 veitti føroyska ráðgevaravinnan 31 prosent av sínum tænastum til landið, 47 prosent til kommunurnar og 18 prosent til vinnulívið. Í 2015 var parturin hjá landinum 22 prosent, kommununum 39 prosent og vinnulívinum 37 prosent.

Uppgerðin hjá Ráðgevarafelagnum vísir sostatt, at tað almenna tilsamans framvegis

er størsti kundin hjá ráðgevaravinnuni, men merkisvert er, at landsins partur minkar lutfalsliga, meðan tann privati parturin er tvífaldaður upp á fimm ár.

Tilsamans 70 prosent av limunum í Ráðgevarafelagnum svaraðu spurnarblaðnum í 2015. Íalt veittu fyritøkurnar, ið svaraðu, tænastur fyri 85 mió. kr. Í 2011 veittu fyritøkurnar tænastur fyri 58 mió. kr.

Privati parturin øktist úr 10,5 mió. kr. í 2011 upp í 31 mió. kr. í 2015. Landsins partur var 18 mió. kr. í 2011 og 19 mió. kr. í 2015. Kommunali parturin øktist úr 27 upp í 33 mió. kr.

Umsetningurin hjá øllum ráðgevarafyritøkunum í 2015 var 122 mió. kr. og 77 mió. kr. í 2011.

Uppgerðin hjá Ráðgevarafelagnum vísir eisini, at meira enn helmingurin av arbeiðunum var bygningar, 59 prosent í 2015. 37 prosent vóru anlegg og 2 prosent planlegging. Í 2011 vóru 65 prosent av arbeiðunum bygningar, 24 prosent anlegg og 8 prosent planlegging.

## 2011 í prosentum




## 2015 í prosentum




## 2011 í tølum




## 2015 í tølum





# NÓGVAR SPENNANDI AVBJÓÐINGAR Í FØROYUM

Bárður Róin Johannesen gjørdist byggifrøðingur í 2014 og verður í januar 2017 liðugur við kandidatútbúgving í leiðslu og upplýsingarfrøði. Í summar var hann knýttur at LBF, har hann stóð fyri at seta í verk nýtt forrit at handfara verkætlanarskjøl. Hann ætlar sær til Føroya eftir loknan lestur, tí í Føroyum fáa lutfalsliga smáar fyritøkur mangan stórar avbjóðingar í byggivinnuni



*Ein stór avbjóðing hjá LBF er útbyggingin á Eystaru bryggju*

Hann er 26 ára gamal og ættaður úr Æðuvík. Tá hann gekk í 9. flokki, var hann 14 dagar í starvsvenjing hjá TN Bygging í Runavík. Har vaktist hansara áhugi fyri handverki, og eftir fólkaskúlan fór hann at læra til timburmann. Stigið at læra til byggifrøðing tók hann í 2011, og eftir at hann gjørdist liðugur í 2014, fór hann undir kandidatútbúgvingina.

"Eg verði eftir ætlan liðugur við høvuðsritgerðina í januar 2017, og tá ætli eg mær heimaftur. Eg havi altíð hildið byggivinnuna vera sera spennandi, og tann føroyska er serliga spennandi, tí hóast fyritøkurnar eru lutfalsliga smáar, eru uppgávurnar ofta stórar og rættliga avbjóðandi," sigur Bárður Róin Johannesen.

Hann vísir á havnarútbyggingina í Havn fyri 465 mió. kr., har LBF við sínum 30 starvsfólkum er høvuðsráðgevi. Verkætlanin er so stór, at hon er størri enn største havnarútbyggingin, sum danska ráðgevarafyritøkan, Rambøll, hevur verið við í. Tann útbyggingin er í Nuuk í Grønlandi og kostar 430 mió. kr.

Bárður er sera fegin um, at hann undir lestrinum fekk møguleikan at vera knýttur at føroyskari fyritøku. Hann søkti sjálvur LBF um ein summarkjans í ár og fekk hann. Eftir loknan lestur vónar hann, at tilknýtið kann halda fram í einum føstum starvi.

"Eg havi altíð vitað, at eg skuldi til Føroya aftur, tí tá eg eri burtur, sakni eg Føroyar. Eg fór víðari til cand. scient. tech., tí tá eg las til byggifrøðing, lósu nógvir aðrir tað sama, og eg helt, at marknaðurin kanska fór at verða mettaður. Eg vóni, at eg kann fáa eitt starv, har eg eisini havi eftirlit á arbeiðsplássum, so eg eisini fái tann praktiska partin við," sigur Bárður Róin Johannesen.

Hann skrivar á Aalborg Universiteti í Keypmannahavn høvuðsritgerð um fólk og tøkni.

"Tøknin broytist allatíðina í vinnuni, og umráðandi er, hvussu tú handfer hana, og um tað yvirhøvur er gagnligt altíð at taka nýggja tøkni í nýtslu. Henda kann, at fólk ikki vilja brúka hana, og tá hevur tað lítið virði at taka hana í nýtslu. Umráðandi er at tryggja, at nýggj tøkni ger ta nyttu, hon skal, skal hon takast í nýtslu," sigur Bárður Róin Johannesen.



# ÚTBJÓÐING OFTA EIN AVBJÓÐING

**Fleiri av føroysku ráðgevara-fyritøkunum eru smáar. Hetta kann vera ein avbjóðing í sambandi við útbjóðingar, tí kostnaðarmikið er at gera tilboð. Stundum verða útbjóðingar tiknar aftur, og endurgjaldið svarar langt frá til kostnaðin at gera tilboðið. Tað má halda uppat, halda ráðgevararnir**

Í flestu føroysku ráðgevarafyritøkunum eru millum 4 og 10 starvsfólk. Fleiri fyritøkur eru minni enn hetta, og tríggjar eru størri. Tær kappast sínámillum í mongum førum – og eisini við útlendskar fyritøkur um arbeiðir í Føroyum.

Eyðsæð er, at útbjóðarar kunnu fáa fyrimun av, at arbeiðir verða boðin út, ikki minst í sambandi við prísásetingina. Ráðgevarafelagið er heldur ikki ímóti, at skipað verður fyri útbjóðingum, men vísir kortini á, at í summum førum eru tær meira møði enn føði.



"Kostnaðarmikið og tíðarkrevjandi er ofta at gera tilboðini, og stundum er tilboðsgevingin ov krevjandi samanborið við, hvat kann fáast burturúr. Tá skaðar hon kappingarførið hjá fyritøkunum," sigur Selmar Nielsen, formaður í Ráðgevarafelagnum.

Í Danmark er loftið fyri, nær arbeiðir skulu bjóðast út, 500.000 kr., men danska ráðgevaravinnan strembar eftir, at loftið verður hækkað upp í 1,2 mió. kr. Hetta verður gjørt, tí vinnan ásannar, at kostnaðarmikil tilboðsgeving kann skaða lønsemið hjá fyritøkunum.

"Vit mæla til, at almenni útbjóðingar-politikkurin verður liðiligur, eins og hann er í privata geiranum, har arbeiðir kunnu verða boðin út, men samstarvsfelagar meira enn so kunnu verða valdir beinleiðis," sigur Selmar Nielsen.

## Góður útbjóðingarsiður

Ráðgevarafelagið heldur, at almennar útbjóðingar ofta ikki hava verið nóg væl frágingnar, m.a. tí treytirnar hava verið ógreiðar. Felagið hevur eisini gjørt vart við, at tað er ein ósiður, at útboð verða tikin aftur, tá arbeiðini eru tillutað vinnandi fyritøkunum.

"Í summum førum hava fyritøkur latið tilboð, sum kostaðu eina milión at gera, men fingu bara 200.000 kr. endurgoldnar. Hetta skaðar lønsemið, og tílík framferð er als ikki góður útbjóðingarsiður," sigur Selmar Nielsen.

Dømi eru eisini um, at fyritøkurnar hava ikki fingið upplýst, hvussu metingarparametrini í sambandi við útbjóðingar skuldu vektast. Trupult er tá at geva nøktandi tilboð. Í summum førum hevur Ráðgevarafelagið havt varhugan av, at tey, sum hava skipað útbjóðingartilfarið, hava verið óroynd.

Hetta er eisini óheppið, tí útboðini verða tá ov ógreið.

Hóast felagið í fleiri førum hevur verið ónøgt við útbjóðingarhættirnar, fegnast felagið um tætta samstarvið við land, kommunur og privata geiran. Felagið er sannført um, at besta samstarvið verður rokkið við støðugum samskifti millum partarnar, so bestu úrslitini kunnu røkkast øllum pørtum at gagni.

# Ráðgevarafelagið hvassorðað í tunnilsmálinum

**Á vári 2015 gjørdist greitt, at P/F Eystur- og Sandoyartunlar uttan útboð hevði latið einum norskum felag upp í hendi at projektera tunlarnar. Hetta fall føroysku ráðgevaravinnuni fyri bróstið, sum fleiri ferðir átalaði, at føroyskar ráðgevarafyritøkar vórðu settar til viks í Føroya størstu verkætlan**

Í brævi til politisku flokkarnar 22. apríl í 2015 undraðist Ráðgevarafelagið stórliga á, at P/F Eystur- og Sandoyartunlar hevði gjørt av at taka upp samband við eitt norskt ráðgevarafelag í sambandi við projekteringina av tunlunum, tá neyðugu førleikarnir til tess longu funnust í Føroyum.

Ráðgevarafelagið skrivaði í almenna skrivinum til allar politiskar flokkar:

"Felagið heldur tað vera ein ósið, at tá stórar verkætlanir skulu gerast í Føroyum, verður stýringin av verkætlanunum ofta avreidd av landinum. Úrslitið gerst tá, at føroysku fyritøkurnar fáa smáuppgávur at taka sær av, sum eru lítið áhugaverdar fíggjarliga og fakliga."

## Førleikar í Føroyum

Felagið vísti á, at politisku flokkarnir frammanundan høvdu avtalað, at føroyskar fyritøkur nettupp skuldu sleppa meira framat í sambandi við nýggju tunlarnar, enn tær sluppu í sambandi við arbeiðini at gera Vágatunnilin og Norðoyatunnilin. Tá høvdu føroyingar fakeftirlitið, byggileiðsluna, gjørdu linjuføringar og projekteraðu vegirnar.

"Stigið, sum P/F Eystur- og Sandoyartunlar ætlar at taka, er óneyðugt," skrivaði felagið til politisku flokkarnar. "Felagið veit, at 90-95 av teimum førleikum, sum krevjast at projektera tunlarnar, finnast í Føroyum. Hetta hava føroyskir ráðgevarar kunnað felagið um. Føroyskir ráðgevarar hava eisini kunnað tingfólk um, hvørjir førleikar eru í Føroyum."

Ráðgevarafelagið vísti á royndirnar hjá føroysku ráðgevaravinnuni farnu hálvu øldina og helt tað vera eina diskvalifisering av føroyskari vinnu, at ein útlendsk fyritøka uttan útboð varð tikin fram um føroysku fyritøkurnar. Felagið staðfesti:

"Ongin føroysk vinna livir av at eta molarnar,

> **ONGIN FØROYSK VINNA LIVIR AV AT ETA MOLARNAR, SUM ÚTLENDSK FELØG HAVNA**

sum útlendsk feløg havna, og okkum kemur í hesum sambandi til hugs gongdina seinnu árini í KT-vinnuni. Breið semja er í dag um, at tá størstu uppgávurnar fóru av landinum, var vinnan fyri alstórum smeiti."

## Nærráðgeving og menning

Føroysku ráðgevararnir hava víst á fleiri fyrimunir við, at føroysk servitan og føroyskir førleikar verða nýttir í verkætlanum sum tunnilsverkætlanini.

Nærráðgeving ger arbeiðið smidligari, kunningina títtari og álitið sterkari. Hetta er avgerandi, skulu tílíkar verkætlanir hepnast væl, hava teir víst á, tí fjarráðgeving kann elva til misskiljingar og ónøktandi arbeiðslag.

Ein annar týðandi fyrimunur er, at ment verður ein vitanarvinna í Føroyum, sum kann draga fleiri væl útbúgvin fólk til landið.

Í londum av somu støðd sum Føroyar er óvanligt, at ráðgeving er á staðnum, og londini mugu tí uttanlands eftir ráðgevingini. Í Føroyum finst ráðgevingin, júst tí hon er støðugt ment í sambandi við mongu útbyggingarnar farnu hálvu øldina.

Umráðandi er, at hendan menningin heldur fram, heldur Ráðgevarafelagið, sum hevur víst á hesi viðurskifti bæði í sambandi við nýggju undirsjóvartunlarnar og arbeiðið at gera skúladepilin í Marknagili, har trupulleikar tóku seg upp m.a. av skeivari útlendskari ráðgeving.





# Hava nú eisini brunatrygd sum serøki

**HMP Consult veitir at kalla alla ráðgeving innan verkfrøði, sum veitast kann, og er haraftrat frammalaga innan brunaserfrøði. Pengar til førleikamenning úr oljuvinnuni gjørdu tað í 2008 møguligt hjá tveimum monnum í fyritøkuni at útbúgva seg innan økið. Síðan hevur HMP Consult ráðgivið um brunatrygd í m.a. Marknagili, BankNordik og á Tórsvølli**

HMP Consult heldur til í Óluvugøtu skamt frá Blómubrekku í Havn, og har hevur fytritøkan húsast síðan 2004. Hon varð stovnað í 2001, tá ringastu brotasjógvarnir høvdu lagt seg eftir kreppuna, og ferð aftur var komin á búskapin. Teir fýra, Hans Haraldsen, Lutherus Meinhartsson, Uni Patursson og Vilhlem Matras, stovnaðu fyritøkuna. Uni er síðan farin burturúr.

Stjóri hjá HMP Consult er Hans Haraldsen. Hann letur væl at gongdini seinnu árini. Nógv er at gera, og uppgávurnar eru bæði fjølbroyttar og spennandi. Hans fegnast um, at føroyingar eru vorðnir alsamt meira sjálvveitandi við ráðgevaratænastum seinnu árini, tí fyrr var ofta neyðugt at senda boð eftir útlendingum, tá servitan kravdist.

"Í sambandi við soppatrupulleikarnar, sum vit hava hoyrt so nógv um, var mangan neyðugt at senda boð eftir serfrøði úr Danmark. Hesa servitan hava vit nú í fleiri fyritøkum í Føroyum, eisini hjá HMP Consult. Á brunaøkinum hava vit eisini ment okkum, so óneyðugt er at senda boð eftir serfrøðingum uttaneftir til tílík arbeiðir," sigur Hans Haraldsen.



*Hans Haraldsen*

## Útbúgving fyri oljupengar

HMP Consult er ein fyritøkunum, sum fekk ágóða av, at útlendsk oljufeløg skuldu vera við til at fíggja førleikamening í Føroyum. HMP Consult fekk í 2008 pening frá British Petroleum til tílíka førleikamenning, og peningurin varð nýttur til at senda tveir mans niður á DTU og DBI at taka ein yvirbygning í brunafrøði. Hans sjálvur var annar teirra.

"Vit veita í dag hesa serfrøðina í sambandi við byggingar í Føroyum. Eitt nú vóru vit við sum brunaserfrøðingar hjá myndugleikunum, tá Glasir skuldi góðkennast. Bygningurin í Marknagili er rættiliga serligur, og hann skal greinast væl við atliti at brunatrygd," sigur Hans Haraldsen.

HMP Consult hevur eisini havt brunaráðgevingina um hendi í nýggja BankNordik-bygninginum í Havn og á Tórsvølli. Á t.d. Tórsvølli snúði arbeiðið seg um at rokna út, hvat hevði hent, um eldur kom í. Útrokningar av tílíkum slag snúgva seg eitt nú um at simulera, at túsundtals fólk eru til staðar. Samsvarandi úrslitinum verða so rýmingarleiðir gjørdar.

## Fleiri í vinnuna

Hóast Hans fegnast um framgongdina í ráðgevaravinnuni, heldur hann, at ov fá fólk eru í sjálvari vinnuni samanborið við talið á serkønum fólki almennu megin. Hevði ein partur av hesum fólkunum virkað í vinnuni í staðin, høvdu fleiri verið at útint praktisku verkætlanirnar, og minni orka hevði verið nýtt til umsiting.

Hann kundi eisini hugsað sær størri nýhugsan í vinnuni. Tá verkætlanir verða framdar, eru mannagongdirnar at kalla tær somu ár eftir ár. Gjørd verða programm, skitsuprojekt, forprojekt, myndugleikaprojekt og høvuðsprojekt. Arbeiðshátturin er tann sami. Tann einasta nýhugsanin er næstan, at nýggj software verður tikin í nýtslu av og á.

"Mannagongdirnar eru heldur tungar, tá verktætlanir skulu setast í gongd, og spurningurin er, um tær ikki kunnu endurskoðast. Øll hoyra, tá onkur útbygging er samtykt og skal fara í gongd, men ofta gongur eitt heilt ár, áðrenn nakað hendir. Vert er at umhugsa, um hetta ikki kann gerast skjótari og effektivari," sigur Hans Haraldsen.

## Finna egnar nisjur

Hann tekur undir við teimum, sum siga, at Føroyar eiga at vera sjálvveitandi við ráðgevaratænastum, og heldur tað vera sjálvsagt, at í Føroyum skulu føroyingar loyva føroyingum framat, tí menna vit sjálv ikki okkara vinnur, er vandi fyri, at ongin átekur sær hesa menning. Pláss er tó fyri at troyta nýggjar møguleikar uttanlands við íslendingum sum fyrimynd, heldur hann.

"Ráðgevaravinnan í Íslandi fevnir breiðari enn tann føroyska. Íslendingar eru t.d. uppií at projektera sólorkuskipanir í Turkalandi og el-mastrar í Russlandi. Teir finna sær lítlar nisjur, har teir eru serliga dugnaligir. Spurningurin er so, hvat vit í Føroyum duga serliga væl, sum onnur hava brúk fyri. Hetta er vert at umhugsa," sigur Hans Haraldsen.



# STEINGRUND RÁÐGEVUR UM LJÓÐ

**Alsamt fleiri fyritøkur við servitan innan ávís økir eru komnar upp á limalistan hjá Ráðgevarafelagnum. Ein teirra er Steingrund Akustik í Saltangará, sum hevur drúgvar royndir at ráðgeva um ljóðviðurskifti av øllum slag**

Steingrund Akustik er familjufyritøka, sum Jóhannes Steingrund, sivilverkfrøðingur við sergrein í akustikki, stovnaði. Fyritøkan hevur 4-5 fólk í starvi og virkar saman við arkitektum, byggifeløgum og byggiharrum fyri, at ljóðviðurskiftini eru í lagi, tá bygningar verða projekteraðir.

Fyritøkan loysir eisini uppgávur fyri arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar, sum vilja tryggja, at ljóðviðurskiftini eru nøktandi fyri trivnaðin. Í sambandi við konsertir og tiltøk tekur Steingrund Akustik sær somuleiðis av ljóðblandi og uppsetingum.

"Okkara arbeiðsøki fevnir rættiliga víða," sigur Jóhannes Steingrund. "Vit arbeiða eisini fyri kommunur og privatfólk, sum vilja fyribyrgja, at óljóð frá virkjum, havnum og ferðslu eru til ampa fyri fólk. Í tílíkum førum gera vit ljóðmátingar og ljóðsimuleringar, sum vísa, hvussu broytingarnar ávirka ljóðviðurskiftini," sigur hann.

## Flutti heim í 2001

Fyrsta verkætlanin, Jóhannes Steingrund var við í av hesum slag, var at tryggja rætta akustikkin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Projekteringin varð gjørd í 1993, og húsið varð tikið í nýtslu í 2001. Fyrstu ljóðmátiuppgávurnar gjørdi hann síðst í nítiárunum í m.a. Havnar kirkju og Gøtu kirkju.

Ferð kom av álvara á ljóðráðgevingina, tá Jóhannes og familjan fluttu aftur til Føroya í 2001. Í fyrstani arbeiddi hann einsamallur í einum mvg-skrásettum felag. Í 2007 varð smápartafelagið skrásett, og eftirspurningurin hevur allatíðina verið vaksandi.

"Tá eg byrjaði, hugsaði eg, at eg fór at hava nógv at gera fyrstu tíðina, og so fór eftirspurningurin at minka. Men eg rakti ongan topp í byrjanini. Heldur er eftirspurningurin støðugt vaksin síðan byrjanina í 2001, og seinastu tvey árini hevur hann verið serliga stórur," sigur Jóhannes Steingrund.

## Objektiv vitan

Hann heldur, at sera áhugavert hevur verið at samskift við myndugleikar, byggimeistarar og ráðgevarar um ljóðviðurskifti, tí ljóðupplivingar hjá fólki eru ofta rættiliga subjektivar. Fleiri meiningar kunnu væl vera um, hvussu ljóðið er í einum rúmi ella bygningi, men tá Steingrund Akustik setir mátitólini upp, verður úrslitið objektivt faktuelt.

"Tá vit máta ljóðið, síggja vit á tølunum, hvussu nógv óljóð er inni, ella hvussu stórur eftirklangurin er. Tað er hesa objektivu vitan, sum alsamt fleiri vilja hava, og tí er eftirspurningurin vaksin," sigur Jóhannes Steingrund.

Eitt hent amboð, tey nýta, eru ljóðsimuleringar. Simuleringarnar verða gjørdar soleiðis, at tekningar frá arkitektinum verða lagdar inn í eitt forrit. Tilfarið til gólv, loft og veggir verður eisini fastlagt. Eftir hetta roknar forritið ymisk ljóðparametur út, t.d. eftirklangstíð og ljóðstyrki. Til ber so at hoyra í hoyritelefonum ella hátalara, hvussu ljóðið er í hølinum.

Ljóðsimuleringar verða serliga brúktar til konserthølir, kirkjur, skúlar og størri skrivstovur og til ljóð uttandura.



# Hesir limir eru í Ráðgevarafelagnum

- SMJ Ráðgevandi verkfrøðingar
- Árni Winther Arkitektar
- LBF
- EYA arkitektur Design
- Teknistovan v/ Eyðun Petersen
- HMP Consult
- Byggitrygd Sp/F
- Fuglø Arkitektar
- Arkitektar 99
- Steingrund Akustik
- MP Tek
- Ráð Sp/F
- Spenn Sp/F
- Innilufttænastan
- Verkfrøðingastovan
- Martin E. Leo
- Kontrast
- Ósbjørn Jacobsen Arkitektar
- Byggiráð
- PB - Consult
- Lon - Byggifrøðilig Ráðgeving
- Preben Hansen, ráðgevandi verkfrøðingur
- Zeta Architects
- MAP Arkitektar
- Sámal Johannesen
- SNA